## TVINGSILSSØLA

**Fríggjadagin, 15. Apríl 2008, kl. 9.15** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir ognina matr.nr. 49 a, Depil (AS nr. 2-5/2008).
Talan er um innangarðs jørð uml. 3.596m² og uml. 153m² ella í alt uml. 3.749 m² og uttangarðs jørð 2 gl. Millum Húsanna.
Tvingsilssølan er umbiðin av Jógvani E. Ellefsen, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 31 12 60 (sak nr. 47436.01), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.
Tvingsilssøluupgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

***Føroya Fútarættur, tann 14. Marts 2008***

um...
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
...er lisin
-so ert tú við!

## Stuðulsfólk Endurlýsing

Søkt verður eftir einum stuðulsfólki til 6 ára gamalt barn við serligum tørvi í Vágs kommunu at byrja **15.apríl 2008** ella so skjótt sum gjørligt og fyribils fram til summarfrítíðina.

Stuðulin kemur í samstarvi við Frítíðarskúlan í Vági, Sosialu deild, NSR tænastuna ì Suðuroy og familjuna, at stuðla barninum í at fáa ein innihaldsríkan og mennandi dag.

Vit ynskja, at tann, ið skal setast, hevur hóskandi útbúgving og royndir.

Arbeiðið er 20 tímar um vikuna, og arbeiðstíðin verður eftir avtalu við Frítíðarskúlan.

Lønin verður sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag .

Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til Annu Djurhuus, sosialdeildarleiðara tlf. 37 36 04.

Umsóknin við prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til Sosialu deild hjá Porkeris – og Vágs Kommunu í seinasta lagi **31. mars 2008. kl 15.00.**

**Sosiala Deild**
**Porkeris Kommuna** **Vágs kommuna**
Við Á 8
950 Porkeri
Tlf 37 36 04
Tlf 22 67 04
Fax 37 46 03
T-post: sosialadeild@email.fo

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Pedagogur til Bústovnin í Børkugøtu 1

Søkt verður eftir pedagogi til Bústovnin Børkugøta 1 til setan 1.mai 2008 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um fulltíðarstarv. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og talan er um at arbeiða dag-, kvøld-, døgn-, vikuskifti og serstakar frídagar.

Á bústovninum búgva 6 menningartarnað vaksin fólk, og fleiri teirra hava likamlig brek. Endamálið er m.a. at bjóða teimun góðar og tryggar menningarkarmar. Tað pedagogiska arbeiði í gerandisdegnum verður skipað efti tørvinum hjá tí einstaka.

**Vit ynskja ein starvsfelaga sum:**
- er útbúgvin pedagogur
- er likamliga væl fyri
- er menniskjansligur og tolin
- hevur góð samstarvsevni
- er áhugaður í at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum
- er opin fyri nýhugsan
- er førur fyri at taka ábyrgd og avgerðir í arbeiðnum

**Vit bjóða:**
- eitt arbeiði, har tú er við at taka avgerðir
- sjálvstøðugar uppgávur

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sólrun Arabo, leiðara, á tlf. 311442 ella 229101.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um Pedagogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um eingin pedagogur søkir starvið, verður starvið sett við hjálparfólki sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið umfatar Nærverkið og deildir undir tí.

**Umsókn:**
Umsókn við próvskjølum, viðmælum og C.V. skal sendast til:
Bústovnurin í Børkugøtu 1
100 Tórshavn
Stílað: Sólrun Arabo, leiðari

**Umsóknarfreist: 21. apríl 2008**

## Avloysarir søkjast til Sambýlið Niðaragøtu 15

Vit søkja avloysarar til Sambýlið Niðaragøta 15, har fýra seinheilaskadd fólk búgva. Hetta eru fólk, ið t.d. hava verið fyri óhappi og fólk, ið hava fingið heilabløðing ella blóðtøpp á heilan.

Hesi fólk bera kognitiv og/ella fysisk brek. Vit arbeiða m.a. nógv við fysiskari og mentalari venjing, sosialisering og hjálp til sjálvhjálp.

Arbeitt verður í skiftandi vaktum, dag- kvøld- og døgnvaktum, bæði gerandisdagar og í vikuskiftum. Neyðugt er, at tú hevur koyrikort.

Um tú hevur eitt positivt lyndi, vilja vit fegin hoyra frá tær.

Send eina umsókn til:

Nærverkið
Trivnaðartænastan
Argjavegur 26
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
Stílað: Hermann Mortensen, virkandi deildarleiðari

**Umsóknarfreist: 11. apríl 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo




W W W . S O S I A L U R I N . F O